

# Hugsa um..

- At pynt og litir hóska til tína persónligheit, hølini, møblarnar og árstíðina.
- At løtan aftan á borðhaldið verður fylt við onkrum beinanvegin, so fólk ikki missa pippið. Til dømis at dansað verður frá borðinum, at barrin letur upp og/ ella at kaffi verður serverað.
- At hava eitt hugnaligt stað til tey, sum vilja sita og práta. Hjá summum er hæddarpunkið í veitsluni at seta seg aftur á við einum góðum cognac og einari stórari cigar.
- At borð í longum røðum ikki altíð er tað hugnaligasta. Til ber eisini at dekka upp í smáum vøkrum eindum, sum ger borðhaldið meira intimt.
- At hava onkran at vaska upp, at rudda borð og til annað praktiskt, so vertir og gestir fáa frið at hugna sær.
- At hava nokk av gardarobuplássi.
- At tað er ofta detaljurnar, sum telja. Hugna um allastaðni, so tað er pent longu tá fólk koma til portrið, í garðinum, í durinum, á vesinum og so framvegis.
- At aðrastaðni stendur »dresscode« ofta á innbjóðingini. Til dømis galla, summarsligt, avslappað, onkrir ávísir litir ella stíl.
- Vanliga halda vit veitslur um kvøldið og út á náttina. Men tað er vorðið alt vanligari at hava morgunmatarborð, brunch ella seinnapartsball, sum serliga hóska væl, har børn og gomul fólk eru við.



## Øðrvísi veitslu-konsept

*Vilt í Suðri, Felagið Fegin í Norðoyggjum, Lakeside í Vágum, Kirkjubøgarður, Seglloftið á Tvøroyri*



*Á Seglloftinum á Tvøroyri fært tú eina heildarupplivíng frá Onnu Kirstin Thomsen. Í søguliga slupp-umhvørvinum fæst matur, dansur, tónleikur og undirhald til alt selskapið.*